

Transocean boripallur í myrkri í norskum sjógvi. Mynd: geo365

# Semjast ikki um oljuætlanir fyri 50 milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

23.08.2014 - 10:40

Oljan.fo

Í Noregi er óvissa komin í fýra oljuútbyggingarætlanir. Talan eru um ætlanir í tí norðmenn kalla Norskehavet, tað vil siga útfyri mið-Noregi.

Dagens Næringsliv skrivar at oljufeløgini ikki klára at finna eina semju um hvussu rokningin fyri hesar ætlanirnar skal býtast millum partarnar. Samlaði prísurin fyri hesar ætlanirnar liggur um 50 milliardir norskar krónur, ella góðar 45 milliardir danskar krónur.